## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:** Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi, seinnapartin nakað minni vindur. Regn ella mjørki av og á og hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:** Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:** Lot til andøvsgul av útsynningi, seinnapartin veksur hann vindin av vestri. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:** Leygardagin lot av útsynningi ella av ymsum ættum, turt og sólglottar. Sunnudagin veksur hann vindin av landsynningi og regn. Hitin millum 12 og 16 stig.

*Juni var bæði turrur í lýggjur. Avfallið var bert 17mm ímóti 66mm, sum er miðal yvir 30 ár. Miðalhitin var 9,9°c ímóti 9.0°c yvir 30 ár.*

# Summarsligt rabarbuøl

**Føroya Bjór kemur nú við einum nýggjum øli gjørt av malti og nógvum føroyskum rabarbum**

ØL
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Uttanlands verða gjørd fleiri fruktkend sløg av øli, og nú roynir Føroya Bjór seg eisini á tí økinum.

Nýggja ølið hjá Føroya Bjór er frískt og summarsligt. Tað hevur ein léttan smakk og er reyðlitt. Ølið er bryggjað við malti og nógvum føroyskum rabarbum.

Annika Waag, stjóri á Føroya Bjór sigur, at hon ansaði væl eftir, at ølið ikki skuldi smakka ov nógv av rabarbum.

- Tey, sum hava roynt ølið, halda tað smakka væl. Onkur heldur, at ølið er eitt sindur damuligt, sigur Annika Waag.

Rabarbuølið hevur fingið navnið Ydun, sum er navnið a norrønu gudinnuni og ímyndar ævigan ungdóm.

Føroya Bjór hevur leingi ætlað at gjørt eitt øl við navninum Ydun. Ydun var navnið á føroyska bryggjarínum í sínari tíð, og sum Føroya Bjór hevði tætt tilknýti til. Har vóru eisini familjubond.

Ydun hevur somu styrki sum Veðrur.

- Fyritøkan hjá okkum er nú 121 ára gomul, og vit royna framvegis alla tíðina at koma við nýggjum vørum, bæði øli og sodavatni, sigur Annika Waag.




### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 30 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 999 hPa. skamt í útsynning úr Føroyum fer suðureftir og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum komandi samdøgur.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstini vestan fyri Írland grynnast. Brúgvalagið yvir Føroyum fer suðureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/07 kl. 06⁰⁰ – 07/07 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í juli: +0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 06/07 kl. 06⁰⁰ – 07/07 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juli: 2 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

21. juli — Mánin næstur jørðini
22. juli — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 21. juli | 06:32 | 19:02 | 05:32 | 18:02 | 05:47 | 18:17 | 08:32 | 21:02 | 09:32 | 22:02 | 04:47 | 17:17 | 03:47 | 16:17 | 06:47 | 19:17 | 07:47 | 20:17 | 06:17 | 18:47 | 07:32 | 20:02 |
| 22. juli | 07:30 | 19:59 | 06:30 | 18:59 | 06:45 | 19:14 | 09:30 | 21:59 | 10:30 | 22:59 | 05:45 | 18:14 | 04:45 | 17:14 | 07:45 | 20:14 | 08:45 | 21:14 | 07:15 | 19:44 | 08:30 | 20:59 |
| 23. juli | 08:25 | 20:52 | 07:25 | 19:52 | 07:40 | 20:07 | 10:25 | 22:52 | 11:25 | 23:52 | 06:40 | 19:07 | 05:40 | 18:07 | 08:40 | 21:07 | 09:40 | 22:07 | 08:10 | 20:37 | 09:25 | 21:52 |
| 24. juli | 09:16 | 21:40 | 08:16 | 20:40 | 08:31 | 20:55 | 11:16 | 23:40 | - | 12:16 | 07:31 | 19:55 | 06:31 | 18:55 | 09:31 | 21:55 | 10:31 | 22:55 | 09:01 | 21:25 | 10:16 | 22:40 |
| 25. juli | 10:02 | 22:26 | 09:02 | 21:26 | 09:17 | 21:41 | - | 12:02 | 00:40 | 13:02 | 08:17 | 20:41 | 07:17 | 19:41 | 10:17 | 22:41 | 11:17 | 23:41 | 09:47 | 22:11 | 11:02 | 23:26 |